# Útspørkini eru munurin á málverjunum báðum

**Landsliðsvenjarin heldur, at Jákup Mikkelsen hevur betri útspørk enn Jens Martin Knudsen, og tí varð hann tikin fram um í kappingini um føroyska málverjasessin**

LITAVA-FØROYAR
*Jákup Mørk*
*Álvur Haraldsen*

**KAUNAS:** Tað vóru fleiri, sum undraðust á, at tað varð Jákup Mikkelsen, sum byrjaði í føroyska málinum leygardagin. Jens Martin Knudsen spældi seg í øllum førum ikki av liðnum, tá skotar vitjaðu fyri einum mánaði síðan, og sjálvur helt Jákup Mikkelsen í leygardagsútgávu okkara, at hann ikki roknaði við einum plássi millum stengurnar.

Hendan støðan helt sær fram til leygarmorgunin. Jákup Mikkelsen segði í øllum førum sjálvur, at hann als ikki grunaði nakað undan seinastu venjingini.

- Henrik segði við okkum, at nú fóru vit at venja deyðbóltar, og at hann fór at nýta teir ellivu, sum skuldu byrja inni. Fyrsta navnið, sum hann rópti, var mítt, og sjálvandi var eg glaður.

Tá Jákup varð settur á beinkin móti skotum, var grundgevingin, at hann ikki spældi á besta liðnum í Molde. Tað ger hann framvegis ikki, men sjálvur heldur málverjin, at dystarvenjingin er heilt góð.

- Eg spæli dyst hvørja viku sum teir flestu aðrir eisini gera, og mótstøðan er hampuliga góð. Onkun tíð spæla vit móti góðum liðum og aðrar tíðir er lítið at gera, men soleiðis vil tað altíð vera.

### Sparkar ov stutt

Jens Martin Knudsen gjørdist sostatt taparin í málmanskappingini hesaferð. Og grundgevingin hesaferð var ein.

- Henrik segði við meg undan dystinum, at hann tók Jákup framum, tí útspørkini hjá honum koma einar 5-10 metrar longur niðan, og tað má eg so bara góðtaka.



*Jákup Mikkelsen visti av ongum fyrr enn leygarmorgunin, tá Henrik Larsen gav honum boðini undir seinastu venjingini, og Jens Martin Knudsen staðfestir, at tað skjótt kann ganga báðar vegir*

Spurdur, hvørt hann ætlaði at gera enn eina roynd at vinna sessin aftur á landsliðnum, segði Jens Martin, at sjálvandi ætlaði hann tað.

- Tað er kanska ikki so nógv, sum eg fái gjørt, fyri at betra útspørkini. Men vit vita, at tað er sera hørð kapping um plássið, og tað er skjótt at tað kann ganga báðar vegir, so eg má bara royna at hanga í og gera mítt besta, sigur Jens Martin Knudsen at enda.

# Óli: Lat bara týskararnar koma

**Hóast avrikið móti litavum ikki var nakað at reypa av, so er liðskiparin á landsliðnum als ikki bangin um, at virðingin fyri týskarum fer at verða ov stór**

LITAVA-FØROYAR
*Jákup Mørk*
*Álvur Haraldsen*



*- Sjálvt um vit nokk ongan tíð hava hitt eitt so sterkt lið, so hava vit møtt nógvum góðum leikarum, og vit vita, hvat vit sjálvir kunna, heldur føroyski liðskiparin, Óli Johannesen*

**KAUNAS:** At síggja føroyska landsliðið spæla fyrra og seinna hálvleik leygardagin, var sum dagur og nátt. Serstakliga seinasta triðingin av dystinum gjørdist talan um eitt satt føroyskt trýst á litaviska málið.

Eftir dystin fingu vit orðið á føroyska liðskiparan, Óla Johannesen og spurdu hann, hvør orsøkin var til, at tað var somikið stórur munur á báðum dystarhálvunum.

- Í hálvleikinum ásannaðu vit allir, at her mátti okkurt henda. Tað, sum vit høvdu víst fram til tá, var snøgt sagt ikki nóg gott. Móti Skotlandi vístu vit, hvat vit megna, tá spælið hjá okkum riggar, og allir sum ein vóru vit samdir um, at vit ikki vístu í nær námind sama spæl hesaferð.

- Í seinna hálvleiki eydnaðist tíbetur hjá okkum at reisast. Teir megnaðu heldur ikki at halda somu ferð á spælinum alla tíðina, og tá teir møddust, vóru tað so avgjørt vit, sum vóru við yvirlutan, og eg eri vísur í, at fingu vit skorað eitt mál, so hevði seinasta løtan blivið heilt spennandi.

Serstakliga í fyrra hálvleiki sást føroyski skiparin hava nakrar orðadráttir við dómaran, og tá vit eftir dystin spurdu um hetta, helt Óli fyri, at hann noyddist at gera okkurt.

- Hasin dómarin var nú ikki serliga góður.Teir fingu allar teir smáu dómarnar til sín fyrimun, og hetta royndi eg at vísa á. Og eg helt eisini, at vit fingu okkurt burturúr hesum. Í øllum førum gjørdist hann meira uppmerksamur uppá, hvat hinir gjørdu, so tosið hjá mær tænti sínum endamáli í so máta.

### Ræðast ongan

Tá spælið gekk somikið illa móti Litava, kundi onkur kanska óttast dystin móti týskarum, sum nú er á skránni, men Óli Johannesen helt tó ikki, at hetta var nakað at óttast.

- Sjálvandi vita vit, at tann dysturin er enn torførari, men hetta er ein uppgáva, sum vit hava glett okkum til leingi. Her sleppa vit at spæla móti nøkrum av heimsins bestu leikarum, og tað er altíð nakað, sum man gleðir seg til. Og eg eri púrasta vísur í, at innsatsturin frá hvørjum einstøkum leikara verður 100% til tann dystin. Tað eigur hann sjálvandi altíð at vera, men onkursvegna var tað bara ikki so, tá vit byrjaðu dystin leygardagin, og tað var stórt spell.

Spurdur, um virðingin fyri týsku stjørnunum ikki kann gerast ov stór, sigur Óli, at tað er hann ikki bangin um.

- Vit skulu sjálvandi altíð hava virðing fyri mótstøðuliðunum. Vit kunnu snøgt sagt ikki loyva okkum at lata vera. Men hinvegin haldi eg ikki, at tað er so at vit óttast nakran. Vit eru eftir hondini nógvir á liðnum, sum hava verið við nóg so leingi. Og sjálvt um vit nokk ongan tíð hava hitt eitt so sterkt lið, so hava møtt nógvum góðum leikarum, og vit vita, hvat vit sjálvir kunna, so eg ivist ikki í, at vit fáa ein góðan dyst mikudagin, sigur Óli Johannesen at enda.



# Jón Rói kannar sær ikki sessin

**Hóast hann undir Henrik Larsen hevur verið greitt fyrsta val til annan av miðverjusessunum, so vil Jón Rói Jacobsen ikki hoyra talan um, at hann skal eiga nakað pláss á landsliðnum**

LITAVA-FØROYAR
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*

**KAUNAS:** Aftur hesa ferð stóð Jón Rói Jacobsen eina sterkastu í myndini av føroysku landsliðsleikarunum. Hóast sín unga aldur tykist hann soleiðis longu nú hava sett seg rimmar fast á annað av miðverjaplássunum, men sjálvur vildi Jón Rói tó ikki siga nakað um, at hann nú átti fast pláss á liðnum.

– Tað er tað nokk eingin, sum kann siga uttan víðari.



*– Mær dámar væl stórar avbjóðingar, og hetta er so avgjørt ein av teimum størstu, heldur Jón Rói Jacobsen um komandi dystin móti Týsklandi*

Har eru góðir leikarar, sum standa klárir á beinkinum, so tað kann verða heilt skjótt, at onkur av teimum kemur inn, so eg kenni meg ikki vísan í nøkrum sum helst, sigur hann.

### Gleðir seg

Um sjálvan dystin helt Jón Rói eins og hinir, at føroyska liðið var undir einum øgiligum trýsti fyrstu løtuna.

– Eg veit ikki hví, men vit fingu einki at rigga, og tí vóru vit alla tíðina undir trýsti. Seinna hálvleik fingu vit tó broytt nakað, og seinastu 25 minuttirnar áttu vit at hava skorað í hvussu so er eitt mál.

Spurningurin til mikudagin er helst, at um føroyingar vóru undir somikið stórum trýsti av nøkrum meira ella minni ókendum litavum. Hvussu verður tað so, tá nøvn sum Ballack, Klose og Kahn fara at standa hinumegin. Men hesum var Jón Rói ikki so nógv fyri at tosa um.

– Tað er ikki fyrr enn nú, at eg fari at hugsa um tað. Vit kunnu bara loyva okkum at taka ein dyst í senn, og nú fara vit so at fyrireika okkum til Týsklands-dystin, men tað er púrasta klárt, at eg gleði meg. Mær dámar væl stórar avbjóðingar, og hetta er so avgjørt ein av teimum størstu, helt Jón Rói Jacobsen at enda.

# Rógvi brendi størsta kjansin

**Rógvi Jacobsen iðraði seg sjálvandi um møguleikan, sum hann misnýtti nakað fyri leiklok, tá hann brádliga gjørdist leysur í litaviska brotsteiginum**

LITAVA-FØROYAR
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*

**KAUNAS:** Størsti føroyski málmøguleikin í dystinun móti Litava var uttan iva tann, sum Rógvi Jacobsen fekk tólv minuttir fyri leiklok, tá hann púrasta einsamallur skeyt í krovið á málverjanum úr fimm metra fjarstøðu.

Eftir dystin fingu vit orðið á Rógva, og vit spurdu hann, hvussu hann upplivdi støðuna, tá møguleikin beyðst.

– Andrew lat bóltin fara víðari til mín, tá hann varð sendur innfyri. Eg gjørdist eitt sindur kløkkur, tá eg brádliga stóð púra leysur framman fyri málinum. Eg ætlaði fyrst at senda bóltin inn við nærmastu stong, men onkursvegna broytti eg støðu í skotløtuni, og ístaðin skeyt eg bara beint fram.

– Og tað er einki sum eitur, at eg eigi at skora upp á handan kjansin. Eg ivist ikki í, at fekk eg túsund slíkar afturat, so eg skorað upp á teir allar, men akkurát hasa ferð skuldi tað bara ikki verða.

Um sín leiklut í dystinum helt Rógvi annars, at tað eydnaðist honum hampuliga væl at gerast partur av spælinum, tá hann varð skiftur inn.

– Tað tóktist fyri mær, sum um vit høvdu hampuligt pláss á miðjuni. Kanska vóru teir troyttir ella kanska slappaðu teir eitt sindur av. Undir øllum umstøðum gav tað okkum møguleika at leggja trýst á, og sum tú sjálvur veitst, so fingu vit eisini møguleikar, men tað gekk bara ikki at skora.



*– Fekk eg túsund slíkar afturat, so eg skorað upp á teir allar, heldur Rógvi Jacobsen um stóra møguleikan, sum hann brendi leygardagin*

# Øssur hevði »gullbrúdleyp«

**Landsdysturin leygardagin var dystur nummar 50 hjá Øssuri Hansen í føroyska landsliðsbúnanum. Nú eru fýra farnir um teir hálvthundrað dystirnar á landsliðnum**

LITAVA-FØROYAR
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*

**KAUNAS:** Tá Øssur Hansen gjørdi av at koma við aftur á føroyska fótbóltslandsliðið gav hetta honum samstundis ein møguleika at gerast fjórði føroyski landsliðsleikarin, sum rundaði 50 dystum. Og tá vit eftir dystin spurdu hann, um hetta var nakað serligt fyri seg, segði hann avgjørdur, at tað var tað.

– Sjálvandi er tað tað. Ikki bara at eg eri tann fjórði, men yvir høvur at hava spælt 50 ferðir á landsliðnum, tað er nakað serligt. Og tað var eisini ein av orsøkunum til, at eg broytti støðu. Eg meini so við, at tað vildi í øllum førum verið keðiligt at verið standandi á 49 dystum, tá eg nú hevði møguleikan at runda tey hálvt hundrað.

Sjálvan dystin kundi Øssur tó eins og hinir hugsað sær øðrvísi, men hann helt kanska, at hetta kundi hava nakað at gera við virðingina, sum føroyingar høvdu.

– Tá vit spældu her fyri nøkrum árum síðani, vóru vit undir einum veldugum trýsti, og tað var kanska tað, sum vit óttaðust hesaferð. Liðið hjá teimum var als ikki so gott hesaferð, sum tað vit tá spældu ímóti, men virðingin hjá okkum var for stór, og vit taptu nokk dystin upp á fyrra hálvleikin. Tað er tað nokk eingin av leikarunum, sum er ósamdur við mær í.